UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **16. august 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-15**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-009/2021 eftir § 52 a í tingskipanini um hjálparpakka til festivalar frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kunnu tónleikafestivalar vænta at fáa hjálparpakka fyri festivalar, sum vóru avlýstir í summar?
2. Hvat er ætlanin at veita festivalunum endurgjald fyri?

Svar

Til 1: Arbeitt verður í løtuni við at fyrireika eitt lógaruppskot, ið eftir ætlan verður lagt fyri Løgtingið í næstum. Væntast kann tí, at ein hjálparpakki til tónleikafestivalar verður klárur einaferð í heyst.

Til 2: Ætlanin er at veita stuðul á leið sama hátt sum í løgtingslóg nr. 103 frá 25. juni 2020.

Undir tágaldandi skipan fingu tónleikafestivalar stuðul til at endurrinda øll atgongumerkir, ið festivalurin hevði selt. Stuðulin kann tó samanlagt í mesta lagi svara til 85% av útreiðslunum í sambandi við fyrireikingina av viðkomandi festivali í 2021.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður